Sosialurin





## Ivi um bin Laden

Pakistanski forsetin, Asif Ali Zardari, segði í gjár, at pakistanska fregnartænastan vil vera við, at leiðarin í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, Osama bin Laden, er deyður. Zardari segði, at amerikanararnir siga seg ikki vita, hvørt bin Laden er á lívi ella ikki, men at sambært pakistonsku fregnartænastuni er tað mest sannlíkt, at hann er ikki á lívi longur. Talsmaðurin hjá amerikanska uttanríkisráðnum, Robin Wood, sigur við AP, at amerikanskir myndugleikar leita framvegis eftir Osama bin Laden, tí teir halda hann vera á lívi. Talsmaðurin legði afturat, at USA hevur ongar upplýsingar, sum benda á, at bin Laden er deyður.

# Norðborg á veg h

**- Vit eru sera spentir eftir at koma í gongd, og vit halda ikki, at útlitini eru so galin, eitt nú tí, at sildastovnurin tykist vera væl fyri, sigur Jón Rasmussen, skipari. Higartil hevur alt gingið væl á longu heimferðini úr Chili**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggja Norðborg er nú á veg norður gjøgnum Atlantarhavið, og gongst sum ætlað, verður skipið á Klaksvík dýra biðidag, 8. mai.

- Norðborg fór úr Chili 14. apríl, og fyri eini viku síðan vóru teir leysir úr Panamaveitini, har teir eisini lógu í Panama í hálvt annað samdøgur.

Vit hava tosað við Jón Rasmussen, skipara, sum ikki er við skipinum á heimferðini, men er heima og tekur sær av øðrum.

Hann sigur, at siglitíðin úr Chili og heim til Føroya fer at liggja um 22 samdøgur, tá hálva annað samdøgnið í Panama er drigið frá.

### Roynist væl

- Tá Norðborg var leys úr Panamaveitini, høvdu teir sjaskveður á leiðini eystur um Kuba. Vindurin var ímóti og inn á síðuna, men manningin umborð letur sera væl at skipinum, sum vísir seg at vera ógvuliga sjógott og fer væl við sær í sjónum.

Hann sigur, at skipið hevur riggað sera væl, men okkurt smávegis hevur verið.

- Hetta eru tó bara smáting, sum roknast kann við, tá ein nýbygningur verður latin.

Á brúnni umborð á Norðborg á veg heim úr Chili eru Kristian Martin Rasmussen, ið er mynstraður sum skipari, beiggi hansara Páll Rasmussen og sonur Kristian Martin, Bogi Rasmussen.

- Tað verða Bogi og eg, sum koma at skiftast um at føra skipið, og síðan kemur pápi væntandi at loysa av onkran túrin. Eg ivist onga løtu í, at hann hevur hug at sleppa onkran túrin av og á, sigur Jón brosandi.

### Justeringar

Jón Rasmussen væntar, at tá nýggja Norðborg er komin higar til lands, fer tað at taka einar 10-14 dagar at rigga skipið til.

- Chili er langt burtur, so tað eru nøkur ting, ið skulu instalerast og justerast her heima, eitt nú serligur telduútbúnaður til verksmiðjuna, sum Formula letur.

Hann sigur, at sjey flakamaskinur eru umborð á Norðborg, tá hon kemur, men pláss er fyri tveimum maskunum aftrat, sum reiðaríið longu eigur. Hesar verða tó ikki settar í skipið beinanvegin, men tá tað fer at passa inn í gongdina og tíðarrammuna.

- Umborð á gomlu Norðborg, sum í dag kallast Christian í Grótinum, eru seks flakalinjur.

Jón sigur, at gamla skipið í løtuni stendur í dokkini á



*Hon tekur seg væl út við bryggju í Chili. Henda myndin er tikin fyri eini tíð síðan*

Skála, og í vikuni hava fólk, sum hava áhuga í at keypa skipið, verið og hugt.

- Í fyrstu syfti verður gamla Norðborg seld, og síðan fer tíðin at vísa, hvussu verður við teimum rættindunum, leggur hann aftrat.

Áður hevur Kristian Martin sagt, at tað ikki er óhugsandi, at felagið fer at útvega sær eitt annað skip, sum tíðin gongur.

- Orsøkin til, at vit hava gjørt av at kalla nýggja skipið Norðborg og ikki Christian í Grótinum er, at Christian í Grótinum ikki var seldur, tá navnið varð sveisað á nýbygningin. Norðborg er eisini vorðið eitt kent navn á sínum marknaði við matvøru úr pelag-

# Veðurvánir spældu bátafestivali eitt puss



*Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum í Nes kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Nú veðurvánirnar fyri leygardagin eru so ivasamar, hevur nevndin aftanfyri Bátafelagið í Nes kommunu tikið avgerð um at útseta bátafestivalin í eina viku**

FESTIVALUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bátafestivalurin, sum skuldi verða á Toftum nú leygardagin, er útsettur í eina viku og verður í staðin leygardagin 9. mai.

Hetta er endaliga greitt eftir fundin, sum nevndin í felagnum, ið stendur aftanfyri tiltakið, tók á fundi seinnapartin týsdagin.

Hyggja vit, hvat DMI (Danmarks Meterologisk Institut) í morgun sigur um veðrið leygardagin, fer ættin at liggja millum útsynning og vestan, og vindmegin fer at liggja millum 15 og 20 metrar um sekundið.

Ættin fer upp í vestan, og vindurin minkar niður í 10-15 metrar um sekundið.

Sunnudagin minkar vindurin uppaftur meira, niður í 5-10 metrar um sekundið, og ættin fer framhaldandi at liggja um vestan.

### Sama skrá

Høgni W. Høgnesen, formaður í Bátafelagnum í Nes kommunu, sigur, at tað er umráðandi fyri ein slíkan bátafestival, at veðrið roynist nøkulunda, men veðurvánirnar til leygardagin eru ivingarsamar og einki serligar.

- Vit hava tí tikið avleiðingarnar av hesum og hava gjørt av at útseta tiltakið í eina viku - ella til leygardagin 9. mai.

Hann vísir á, at skrá og tíðir, sum lagdar eru fyri bátafestivalin, verða júst tær somu sum í løgdu skránni.

### Kanska Hallur

- Einasta broyting er, at tað helst ikki verður Dansiorkestrið, sum kemur at spæla til dansin leygarkvøldið og sunnunáttina, men Hallur Joensen. Hetta fara vit at kunna um so skjótt, tað er endaliga greitt.

Høgni W. Høgnesen sigur seg vóna, at nógvir bátar og hópur av fólki koma til bygdar, tá ársins fyrsti bátafestivalur verður hildin á Toftum leygardagin 9. mai - vónandi í bestu líkindum.